# Fólkauniversitetið vitjaði Miðlahúsið

## VEÐRIÐ




**Veðrið í dag**
Gul til andøvsgul av landssynningi, 5 til 10 m/s. Út á dagin minkar vindurin og lækkar í ein sunnan og í ein útsynningi. Mest skýggjað veður, av og á regn. Hitin millum 8 og 12 stig.




**Veðrið leygardagin**
Lot til andøvsgul av vestri, 3 til 8 m/s, sum snarar í ein sunnan, seinni í ein landssynning og veksur upp til 8 til 13 m/s. Skýggjað, men eitt skifti klárari veður. Hitin millum 8 og 12 stig.




**Veðrið sunnudagin**
Andøvsgul til strúk í vindi av landssynningi, 8 til 13 m/s, í bilum upp í 15 m/s. Skýggjað veður, og av og á regn. Hitin millum 8 og 12 stig.

Veðrið mánadagin
Andøvsgul til strúk í vindi av landssynningi, 8 til 13 m/s, sum út á dagin minkar niður í 5 til 10 m/s. Skýggjað við regni av og á. Hitin millum 8 og 12 stig.

**Hósdagin vitjaðu 40 fólk frá Fólkauniversitetinum í Viborg í Danmark redaktiónina hjá Sosialinum í Miðlahúsinum í Vágsbotni**

VITJAN
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Tey eru í løtuni á skeiði á Føroya Fólkaháskúla - og er hetta partur av undirvísingini á Fólkauniversitetinum.

Tað er Torben Johannesen, prestur og fyrrverandi stjóri á Føroya Fólkaháskúla, sum er ferðaleiðari hjá teimum, og á háskúlanum hava tey ymsar gestalærarar.

Hugtakið við fólkauniversiteti er útbúgving til eldri fólk á studenskúlastigi og hægri. Talan er um frítíðarundirvísing, einamest um kvøldið.

Tey á Fólkauniversitetinum ferðast nógv - og tað ber eisini til bara at vera við til ferðirnar.

Á háskúlanum í Havn hava tey fingið innlit í ymisk viðurskifti. Eitt nú hevur Tórbjørn Jacobsen, løgtingsmaður hugleitt um nútíðar føroyskan politikk. Kári Sverrisson hevur greitt frá um føroyskan tónleik. Tey hava eisini vitjað ymsu søvnini og verið túrar í fjøllunum, har Torben Johannesen hevur greitt teimum frá.

Í Miðlahúsinum í Vágsbotni kundi prátið sjálvandi inn á Rybergtíðina, kongiliga einahandilin, um handilsvirkini hjá Restorff, Heinesen og Lützen, sum hava hildið til í hølunum her - umframt sjálvandi føroyska blaðsøgu.

Tað eru eldri fólk - summi fyritíðarpensjónistar, ið luttaka á skeiðunum hjá Fólkauniversitetinum - og tey lóta sera væl at Føroyavitjanini.




*40 fólk eru við í ferðalagnum hjá Folkeuniversitet í Viborg, og ferðaleiðarin var Torben Johannesen, prestur og fyrrverandi stjóri á Føroya Fólkaháskúla, sum eisini er karmur um Føroyavitjanina*

*Mynd: Bárður Lydersen*

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 0 |
| Nuuk | 3 |
| Qaqortoq | 7 |
| Ammassalik | 6 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 12 |
| Seyðisfjørður | 10 |
| Tórshavn | 10 |
| Lerwick | 11 |
| Aberdeen | 13 |
| London | 22 |
| Tromsø | 10 |
| Bergen | 15 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 14 |
| Keypmannah. | 21 |
| Helsinki | 16 |
| Moskva | 14 |
| Berlin | 24 |
| Warzawa | 19 |
| Kiev | 17 |
| Bukarest | 24 |
| Paris | 25 |
| Madrid | 27 |
| Róm | 31 |
| Malorca | 30 |
| Athen | 29 |
| Malta | 32 |
| Tunis | 38 |
| Beijing | 34 |
| New Dehli | 30 |
| Bangkok | 33 |
| Jakarta | 29 |
| Sydney | 17 |
| New York | 30 |
| Miami | 28 |
| Los Angeles | 20 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | -- |
| La Paz | 13 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 14 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Eitt hátrýst, 1018 hPa yvir Norskahavið ferðast spakuliga í ein landnyrðing. Eitt lágtrýst við landsynningspartin av Grønlandi, og eitt tilhoyrandi brúgvalag beint vestanfyri Ísland, flyta seg ikki, og lýggj og slævin luft koma yvir oyggjarnar av landsynningi.



Í dag fer brúgvalagið framvið Føroyum, og verður fylgt av kaldari luft úr útsynningi. Seint leygardagin nærkast eitt lágtrýst seg úr útsynningi og verður mánadagin við Føroyar.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 29/6 kl. 06⁰⁰– 30/6. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 9,8°
Minsti hiti máldur í juni: 0,0° - Mesti hiti máldur í juni: 20,0°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,1 mm – mált frá 29/6 kl. 06⁰⁰– 30/6 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í juni: 71,4 mm

I EINUM SAMFELAG HAR TEY VEIKASTU HAVA TAÐ GOTT, HAVA ØLL TAÐ GOTT

WWW.JAVNI.FO

JAVNI




## VESTFALLSKYRRINDI

| | |
|---|---|
| 23. juni | Mánin næstur jørðini |
| 28. juni | Seinna kvarter |
| 5. juli | Jørðin longst frá sólini |
| 6. juli | Tendring |
| 8. juli | Mánin longst frá jørðini |

Kelda. Álmanakkin 2005

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1. juli | 03.30 | 15.56 | 02.30 | 14.56 | 02.45 | 15.11 | 05.30 | 17.56 | 06.30 | 18.56 | 01.45 | 14.11 | 00.45 | 13.11 | 03.45 | 16.11 | 04.45 | 17.11 | 03.15 | 15.41 | 04.30 | 16.56 |
| 2. Juli | 04.18 | 16.41 | 03.18 | 15.41 | 03.33 | 15.56 | 06.18 | 18.41 | 07.18 | 19.41 | 02.33 | 14.56 | 01.33 | 13.56 | 04.33 | 16.56 | 05.33 | 17.56 | 04.03 | 16.26 | 05.18 | 17.41 |
| 3. Juli | 05.04 | 17.28 | 04.04 | 16.28 | 04.19 | 16.43 | 07.04 | 19.28 | 08.04 | 20.28 | 03.19 | 15.43 | 02.19 | 14.43 | 05.19 | 17.43 | 06.19 | 18.43 | 04.49 | 17.13 | 06.04 | 18.28 |
| 4. Juli | 05.52 | 18.17 | 04.52 | 17.17 | 05.07 | 17.32 | 07.52 | 20.17 | 08.52 | 21.17 | 04.07 | 16.32 | 03.07 | 15.32 | 06.07 | 18.32 | 07.07 | 19.32 | 05.37 | 18.02 | 06.52 | 19.17 |
| 5. Juli | 06.41 | 19.06 | 05.41 | 18.06 | 05.56 | 18.21 | 08.41 | 21.06 | 09.41 | 22.06 | 04.56 | 17.21 | 03.56 | 16.21 | 06.56 | 19.21 | 07.56 | 20.21 | 06.26 | 18.51 | 07.41 | 20.06 |

5 707265 100050 >